# Samskip takkar fyri hjálpina

**Á samkomu í Havn fríggjadagin í seinastu viku, nýtti skipafelagið Samskip høvið at takka føroysku sjóbjargingarstøðini fyri arbeiðið, støðin gjørdi, tá farmaskipið Jøkulfell sakk**

TØKK
*Edvard Joensen*

Fríggjadagin i seinastu viku var samkoma á skrivstovuni hjá skipafelagnum Samskip í Havn, har aðalstjórin i íslendska felagnum handaði setta leiðaranum á føroysku sjóbjargingarstøðini eina viðurkenning fyri arbeiðið, føroyska MRCC støðin gjørdi í samband við, at farmaskipið Jøkulfell sakk norðan fyri Føroyar fyrr í vár.

Tað var sjálvur forsetin í Eimskip, Knútur G. Haukson, sum handaði Jóan Jacobi Jacobsen, settum leiðara á MRCC støðini í Føroyum, ein kekk áljóðandi 100.000,- krónur sum viðurkenning fyri tað arbeiðið, sum støðin gjørdi í samband við bjarging og leiting, tá Jøkulfell sakk, greiðir Joel undir Leitinum, stjóri í Samskip Føroyar, frá.

– Leiðslan í felagnum hevur alla tíðina, síðan vanlukkan hendi, ætlað, at føroyska sjóbjargingarstøðin skuldi fáa eina viðurkenning. Og gjørt varð so av at gera tað í samband við, at eitt ár var liðið, síðan Samskip byrjaði regluliga sigling upp á Føroyar, greiðir Joel undir Leitinum frá.

Tað er nógv hent hetta árið, síðan Samskip byrjaði regluliga sigling við eini lítlari skrivstovu í Klaksvík, sigur hann.

Í dag hevur felagið tvær rutur millum Føroyar og útheimin við hvør sínari føroyskari havn. Klaksvík og Kollafirði.



*Knútur G. Haukson, stjóri í Samskip, handaði Joen Jacobi Jacobsen, settum leiðari á sjóbjargingarstøðini, ein kekk sum viðurkenning fyri tað arbeiðið, sjóbjargingarstøðin gjørdi, tá Jøkulfell sakk*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Skipið, sum fer úr Klaksvík, siglir upp á Immingham í Bretlandi og Rotterdam í Hollandi. Hendan rutan er nú broytt frá fyrr at hava havt fráferð úr Klaksvík mánadag til at fara avstað hóskvøld klokkan 23.00.

Hin rutan, Samskip hevur til og úr Føroyum, er úr Kollafirði til europeiska meginlandi og Skandinavia, sigur Joel undir Leitinum.

Joel undir Leitinum váttar fyri Sosialinum, at ætlanir eru um ymiskar útbyggingar i Kollafirði. Hann vil tó enn ikki siga nakað nágreiniliga um, hvat hesar útbyigngar fara at umfata. Bert tað, at talan er um eina ætlan, sum fer at gera Samskip sjónligari í Kollafirði og Føroyum sum heild.

# Kórstevna leygardagin

**Leygardagin 9. apríl verður regluliga kórstevnan hildin. Stevnan verður í ár í Eysturskúlanum, og tólv kór umframt felagskór fara at hava framførslu**

KÓRSTEVNA
*Edvard Joensen*

Tólv ymisk kór umframt stórt felagskór fara at luttaka á kórstevnuni, sum í ár verður hidlin á Eysturskúlanum. Stevnan verður hildin leygardagin 9. apríl, og byrjað verður við felagsvenjing frá morgninum, sigur kórsambandið.

Stóra konsertin í samband við kórstevnuna verður í skúlanum klokkan 17.00 seinnapartin, har kórini fara at framføra hvør sína skrá, eins og felagskór fer at syngja, áðrenn og eftir at tey ymsu kórini sleppa framat.

Raðfylgjan, kórini framføra í, er funnin við lutakasti. Fyrsta kórið, sum framførir, er Glymur, og síðan er raðfylgjan hendan: Ljómur, Vestmanna Sangkór, Nólsoyar Sangkór, Kristiliga Sangkórið, Rútmiska kórið í Hoydølum, Vágakórið, Felagskórið Gøta/Leirvík, Kamarkórið, Dreingjakórið undir Brúnni, Kórið í Kvívík og at enda Havnarkórið.

Til at stjórna felagskórinum eru ikki færri enn seks av kórleiðarunum hjá teimum luttakandi kórunum.



*Stóra konstevnukonsertin í ár verður í Eysturskúlanum í Havn leygardagin 9. apríl klokkan 17.00*

## Vaksandi klamydiatíttleiki

Talið av klamydia-vertum í Føroyum hevur verið støðugt vaksandi síðani 1997

Hetta staðfestir landslæknin, sum hevur sent tíðindabræv út hesum viðvíkjandi.

Talið á klamydiatilburðum í Føroyum er støðugt vaksandi. Í 2004 vóru 988 vertir (prøvar) kannaðir á Landssjúkrahúsinum fyri klamydia, og av hesum vóru 146 positivir. Tvs., at 14,8 % av vertunum vóru positivir. Talið hevur verið støðugt vaksandi síðan 1997, har ið 20 vóru positivir.

Viðmerkjast skal, at 1. juli 2001 var kanningarhátturin á starvsstovu Landssjúkrahúsins broyttur, og eigur hetta sín stóra lut í, at fleiri positivir vertir vóru funnir.

Í Danmark hevur talið á klamydia eisini verið vaksandi seinastu árini. Tølini fyri 2004 eru ikki endaliga tøk enn, men sambært Heilsustýrinum fer tað at vera hægri enn 20.000. Tað veruliga talið á fólki, ið smittað er við klamydia í 2004, verður mett at vera eini 50.000. Viðvíkjandi gongdini í Danmark seinastu árini verður víst til talvu 2.

-jm

# Fundur um kvinnupolitiskt virksemi

**Mánakvøldið veðru fundur í Norðurlandahúsinum, har kvinnupolitisk virksemi fer at standa á skránni. Fleiri menn verða millum fyrilestrahaldararnar**

KVINNUPOLITIKKUR

Mánakvøldið klokkan 19.30 veðru fundur í Norðurlandahúsinum, har evnið verður kvinnupolitiskt virksemi.

Í tíðindaskrivi siga fyrireikararnir, at fundurin verður skipaður sum pallborðsfundur, har áhoyrararnir eftir innleggini sleppa at seta pallborðinum spurningar um tey evni, sum hava verið viðgjørd.

Umframt beinleiðis fyrilestrakend innlegg, verður eisini eitt sindur av løttum undirhaldi á fundinum, siga fyrireikararnir.

Skráin, sum løgd er fyri fundin, sær soleiðis út:

Hans Pauli Strøm fer at greiða frá uppskotinum frá Útnorðurráðnum til samtyktar: »Arbeiði fyri at kvinnur fáa øktan leiklut í at taka politiskar avgerðir«.

Rúna Sivertsen greiðir frá hvat tær hava arbeitt við í Útnorðurbólkinum og hvat skal henda í framtíðini.

Annika Olsenfer at tosa um, um vit skulu broyta hugburin í skúlanum og vekja áhugan hjá kvinnum fyri politikki.

Eyðun Andreassen hugleiðir um spurningin: »Hví gongur tað so striltið at fáa kvinnur aktivar og er tað neyðugt? Verjir tað demokratiið, um fleiri kvinnur verða politiskt aktivar? Ella skulu kvinnur verða verandi í køkinum?«

Øssur Winthereig fer at hugleiða um, um vit skulu útbúgva valevnini til at koma í fjølmiðlar? Hvat kann ein krevja av valevnum ella fólkavaldum í samband við valsendingar í fjølmiðlum? Er tað í lagi, at jounalistar kasta ìrunubløkî eftir fólkavaldum?

At enda fer Marjun í Kálvalíð at framføra ein einmansleik við einum spískum, skemtiligum vinkli til kvinnur, menn og politikk.

ej